Fylgiskjal 7

Fra: Joanna Djurhuus <JoannaD@vmr.fo>
Sendt: 25. juli 2026 10:37
Til: UFMR Postkassi <ufmr@ufmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>
Cc: Símun Grønadal <Simun.gronadal@ufmr.fo>; Elin Mortensen <elinm@ufmr.fo>; Katrina Michelsen <katrina@ufmr.fo>; 'annfinnur@fsn.fo' <annfinnur@fsn.fo>; Finnbjørn Vang <snarbjorn@hotmail.com>; Jan Højgaard <jan@fiskimannafelag.fo>; johannus@jmo.fo; samtak@samtak.fo; stefan@industry.fo; Jógvan Hansen <jh@jfk.fo>
Emne: Viðv. uppskoti til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

Til Uttanríkis- og fiskimálaráðið

Viðv. uppskoti til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

Fiskivinnuráðið hevur ikki havt stundir at hava fund um málið, sum er sent Fiskivinnuráðnum í hægstu feriutíð við eini hoyringarfreist upp á einans fýra dagar.

Hóast stuttu freistina hava umboðini fyri Fiskimannafelagið, Skipara- og navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið og Meginfelag Útróðrarmanna latið viðmerkingar (viðfest). Aðrir limir í ráðnum hava ikki svarað, men freistin fer á midnátt í kvøld, og tí verður heitt á hesi umboð um at senda Fiskimálaráðnum møguligar viðmerkingar beinleiðis.

Vinarliga v. Fiskivinnuráðið
Jóanna Djurhuus, formaður